Oljan d‡rkar ruskhitan

Orsøkin til hækkandi prísirnar á fjarhita eru høgu oljuprísirnir. Hetta hóast Fjarhitafelagi › als ikki n‡tir olju

Jákup Mørk

- Vit hava ikki framt nakra príshækking, so hasin spurningurin er skjótt svara›ur, sigur stjórin í Fjarhitafelagnum, Jóannes Hansen, tá vit spyrja hann um frábo›a›u prísbroytingarnar hjá fjarhitafelagnum.

Ví›ari grei›ur stjórin frá, at Fjarhitafelagi› øll árini hevur havt ein príspolitikk, har roynt hevur veri› at fylgt oljuprísunum so væl sum gjørligt.

- Flestu árini hevur hetta ikki veri› nakar trupulleiki, tí oljuprísirnir hava veri› somiki› stø›ugir, men seinastu tí›ina hevur prísvøksturin á olju veri› sera ógvuslig, og hesum hava vit so valt at leggja upp fyri nú. Vanliga hevur ta› annars veri› solei›is, at prísbroytingar ikki merkjast fyrr enn 1. januar, tí n‡tararnir gjalda á conto gjøld gjøgnum ári›, og ein møguligur munur ver›ur sí›ani útjavna›ur árí› eftir.

- Vit hava tó valt at økja um gjaldi› nú, so hækkanin ikki hev›i veri› ov ógvuslig komandi ár.

Brúkarin skilir einki

Ta› eru annars nógvir fjarhitan‡tarar, sum standa spyrjandi, nú teirra orkugjald fer upp vi› 35% restina av árinum, bert tí oljuprísurin er uppfarin. Fjarhitin er jú als ikki tengdur at oljuni.

Til hetta svarar stjórin í felagnum, at Fjarhitafelagi› ongar bindingar hevur í so máta.

- Kundar okkara hava eitt lyfti um, at orkuprísurin hjá teimum ikki fer upp um ta›, sum ver›ur goldi›, um olja var› n‡tt ísta›in. Tey hava ongantí› fingi› lyfti um, at tey skulu rinda minni enn a›rir borgarar í Havnini, sigur Jóannes Hansen, stjóri í Fjarhitafelagnum

- Kundar okkara hava eitt lyfti um, at orkuprísurin hjá teimum ikki fer upp um ta›, sum ver›ur goldi›, um olja var› n‡tt ísta›in. Tey hava ongantí› fingi› lyfti um, at tey skulu rinda minni enn a›rir borgarar í Havnini, sigur Jóannes Hansen, stjóri í Fjarhitafelagnum

Hugsar frameftir

Umframt at vísa á, at avger›in er í trá› vi› vanliga príspolitikk felagsins, vísir Jóannes Hansen eisini á, at Fjarhitafelagi› hevur tørv á at konsolidera seg fíggjarliga.

- At felagi› ber seg í dag, merkir ikki, at peningur er tøkur til eina framtí›ar endurn‡ggjan av ognunum. Ta› kann væl vera, at henda endurn‡ggjan liggur langt frammi í tí›ini, men til ta tí› er ney›ugt, at felagi› hevur ney›ugu fíggjarligu orkuna.

Í hesum sambandi kann leggjast afturat, at tá gamla Fjarhitafelagi› fór av knóranum, keypti B‡rá›i› ognirnar á uppbo›i›. Prísurin tá var sjálvsagt væl lægri, enn hann var, tá ognirnar upprunaliga vór›u keyptar. Hetta ver›ur tó ikki galdandi vi› eini framtí›ar endurn‡ggjan, og tí er ney›ugt, at felagi› vinnur væl meira av peningi inn, enn til avskrivingarnar, sum jú eru grunda›ar á lægra keypsprísin.

At enda leggur stjórin afturat, at hansara persónliga fatan er, at oljuprísurin væntandi fer at lækka naka› komandi ári›, og at um so er, fylgir prísurin á fjarhitanum sjálvsagt vi›.

Sostatt er líkt til, at orkuprísirnir fylgja oljuprísunum. Líkimiki› um orkan kemur frá olju ella ikki.

– Fólk eru illa vi›

Ta› kemur illa vi› hjá nógvum, at vit fáa ein stóra eykarokning fyri fjarhitan restina av árinum, sigur Niels Jákup Thomsen, forma›ur í eigarafelagnum Inni á Gøtu

EY›UN KLAKSTEIN

Fólk, sum brúka fjarhita í Havn, hava fingi› eina eykarokning fyri sí›stu tríggjar mána›irnar í ár. Orsøkin er, at oljuprísurin er hækka›ur, og so hækkar eisini fjarhitaprísurin, hóast fjarhitin einki hevur vi› oljuna at gera.

– Fólk eru illa vi›, tí nógv hava fingi› ein eykarokning upp á tvey ella tr‡ túsund krónur fyri tríggjar teir seinastu mána›irnar í ár, sigur Niels Jákup Thomsen, sum er forma›ur í einum av eigarafeløgunum, har fólk brúka fjarhita – tí Inni á Gøtu í Hoyvík.

– Vit hava leingi strí›st vi› Fjarhitafelagi› fyri at fáa prísin ni›ur, men ta› strí›i› hevur einki úrslit givi›. Vit halda, at prísurin er ásettur ov høgt sammett vi› oljuprísin, men hóast Fjarhitafelagi› hevur fingi› álagt at svara okkara grundgevingum, er ta› ikki hent enn.

Fundast um mála›

Í kvøld fara formenninir í eigarafeløgunum, har húsini brúka fjarhita, at hava fund saman vi› felags fjarhitanevndini, sum eigarafeløgini hava sett at arbei›a vi› spurninginum.

Á hesum fundinum ætla tey at vi›gera stø›una, sum er íkomin, nú fjarhitaprísirnir eru nógv hækka›ir.

– Eftir hendan fundin eru vit ivaleyst vor›in eitt sindur klókari og hava tki› eina stø›u til, hvat vit fara at gera, sigur Niels Jákup Thomsen.

Føroyskur frumvøkstur

Løtan var hátí›arhildin, tá fyrstu tríni vóru sett ni›ur í n‡ggju vi›arlundini í Kirkjubø.

Kirkjubøur: Mikudagurin var stórur dagur í søgu føroyska skógfri›arnevndarinnar. Tá var fari› undir at gró›urseta n‡ggja føroyska vi›arlund vi› trúm og runnum, sum vuksu í Føroyum í landnámstí›ini.

Bjarni Djurholm, landst‡risma›ur setti fyrsta træi› ni›ur.

Neyvan ver›ur talan um bærilig trø, heldur um lágan vøkstur og runnar. Fleiri av teimum trøum og runnum, sum vuksu í landnámstí›ini eru enn at finna á stø›um, har sey›ur ikki sleppur at, í bjørgunum.

Skuld lætnar

Landsbankin hevur saman vi› Nor›oya Sparikassa og Unibank sent kommunum, sum hava ein tørv, tilbo› um brævalán til umfígging av verandi skuld.

Nú tí›arfreistin 25. september 2000 er farin, kann sta›festast, at ein nóg stórur partur av kommununum hava gó›kent tilbo›i›.

Føroyski Kommunugrunnurin (FKF) er tí stovna›ur í dag. FKF fer vi› døtturfelagnum FKI at útgeva lánsbrøv til at fíggja keypi› av lánsbrøvum, sum føroysku kommununurnar útgeva.

Hetta merkir, at tær kommunur, sum hava gó›tiki› lántilbo›i›, kunnu vænta sær bíliga endurfígging av verandi kommunuskuldini, tá verandi kommunuavtala útgongur tann 1. desember 2000.

Nógv seinka› ferja

Tórshavn: P/F Skipasmi›jan á Skála, sum hevur sáttmála vi› Føroya Landsstyri um bygging av nyggjari ferju til Sandoyarlei›ina, hevur ídag bo›a› Strandfer›askipum Landsins frá, at vit eftir nógva seinking í samband vi› bygging av skrokkinum í Pólandi, vilja lata Strandfer›sluni nyggja skipi› tann 5. mars 2001.

FUJITSU COMPUTERS SIEMENS

SILVERLINE FARTELDA
- Liteline plus 425A

Við øllum hentleikum, sum krevjast av eini framkomnari farteldu.

TILBOÐ

Liteline plus 425A
- AMD k6-2 500 MHz
- 64 MB RAM
- 10GB Harddisk
- Ljódkort
- Stereo hátalarar
- 24 x CD-ROM
- 56K/V.90 Modem
- Windows 98 2. útgáva
- 12" TFT Monitor
- MS Works Suite 2000
- Age of empires

Kr. 16.895,-

Dømi um fígging:
Útgjald: 5.632,-
Rest yvir 12 mór.: 1.044,- um món.
og yvir 24 món.: 724,- um món.

HENT TASKA
- til fartelduna

Við hópina av lummum til alt, tær tørvar, tá tú ert á ferð

Notepac Plus taska til farteldu
1 Lummi til skjøt - v/3 rúmum
2 Bjálvað teldurúm
3 Bjálvaður rúmdeilari
4 2 fløgulummar
5 Lummi til fartelefon
6 Diskettulummi til 4 diskettir
7 2 lummar til 4 PCMCIA kort
8 Lummi til elektroniskan kalendara
9 Penna/blýantshaldarar
10 Haldari til visitkort
11 Lummi til skjøl

Kr. 625,-

SANSIR TEL 395 395

3arin ELECTRONIC

SMS · Tel 353537 · Fax 353536 · E-mail: electr@post.olivant.fo